## Nógv verri enn hildið

Ein frágreiðing, sum fyrrverandi amerikanski varaforsetin Al Gore og norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, løgdu fram í Keypmannahavn í dag, kemur til ta niðurstøðu, at ísurin við pólarnar og í Grønlandi minkar nógv skjótari enn higartil hildið. Ein avleiðing av tí verður, at heimshøvini fara at fløða hálvan annan metur ta næstu øldina, siga teir. Tað fer at hava við sær, at fleiri milliónir fólk missa hús og heim. Harafturat fara fleiri lond í Afrika at hava trupulleikar við at útvega fólki drekkivatn.



## Andstøðan hevði vunnið

Høvdu sviar havt val til Ríkisdagin í dag, hevði anstøðan vunnið valið. Tað vísir ein nýggj meiningakanning, sum Sifo hevur gjørt. Eftir kanningini høvdu Sosialdemokratarnir, Vinstriflokkurin og Umhvørvisflokkurin fingið 50,2 prosent av atkvøðunum. Tann borgarliga stjórnarsamgongan hjá Fredrik Reinfeldt, forsætisráðharra hevði fingið 40,8 prosent. Kanningin vísir, at Sosialdemokratarnir høvdu fingið ta størstu framgongina og stjórnarflokkurin Moderaterne ta størstu afturgongdina, um val var nú.

# Framleiðsluorkan umborð á Norðborg skal økjast enn meiri

**Kristian Martin Rasmussen, reiðari, letur hampiliga væl at gongdini, síðan Norðborg fór til fiskiskap 6. juni í ár. – Tað kundi havt gingið betri, men tað kundi eisini havt gingið munandi verri. Vit eru nøgdir við gongdina higartil, sigur reiðarin, sum eisini veit at siga, at framleiðsluorkan umborð á Norðborg nú skal økjast við tveimum flakamaskinum aftrat, umframt fleiri skrædlarum og vacum-súgvarum**



*Kristian Martin Rasmussen sigur, at síðan Norðborg fór í vinnu, hava teir havt ymiskar trupulleikar at dragast við, men hesir hava tó ikki verið størri enn tað, at skipið hevur mist lítla fiskitíð*

*Mynd: Dávur Winther*




**NORÐBORG**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Flaggskipið og verksmiðjutrolarin hjá klaksvíkingum Norðborg, sum herfyri legði umleið 3.000 tons av sild og sildaúrdráttum upp í Klaksvík, roynir í løtuni eftir svartkjafti á Munkagrunninum. Teir hava roynt í einar 4-5 dagar og hava fingið umleið 800 tons í lastina. Ein partur av veiðini er heilfryst, nakað er skráskorið, og síðan er ein partur farin til mjøl.

Kristian Martin Rasmussen, reiðari, letur væl at fiskiskapinum, síðan teir komu á leiðirnar á Munkagrunninum.

Á seinasta sildatúri var Bogi Rasmussen skipari, og hendan túrin er bróðirin Jón Rasmussen á brúnni.

Sjálvur hevur Kristian Martin Rasmussen ikki verið umborð, síðan skipið fór á fyrsta túr hin 6. juni í ár – ella beint eftir hvítusunnu.

### Ein fínur túrur

- Á seinasta túri royndi skipið uppi við Lofoten í Noregi. Norðborg var úr Føroyum í einar 17 dagar, harav teir fiskaðu og framleiddu í einar 10-11 dagar. Veiðivirðið á túrinum var millum 14 og 15 miljónir krónur, so hetta var ein fínur túrur, sum Kristian Martin tekur til.

Hann vísir á, at skal árið roynast, er neyðugt við slíkum góðum túrum sum hesum inn ímillum.

- Norðborg er nú á sínum níggjunda túri, síðan skipið fór til fiskiskap. Sjálvandi kundi tað havt gingið betri, enn tað hevur gjørt, men tað kundi eisini havt gingið nógv verri. Vit eru nøgdir við gongdina og halda, at hetta sær rímiliga gott út, sigur Kristian Martin Rasmussen.

Hóast Norðborg er eitt framleiðsluskip, er ikki so ógvuliga lítið, sum kortini fellir til ídanðarvirkið Havsbrún í Fuglafirði, ið vantar rávøru.

Kristian Martin sigur, at á seinasta túri landaði Norðborg tilsamans 400 tons av mjøli til Havsbrún umframt 1150 tons av sildaúrdráttum.

Hann vísir á, at úrtøkan í framleiðsluni til mjøl liggur um eini 18-20%, og tað merkir, at tú skal hava umleið 5 ferðir so nógva rávøru, sum tú fært í mjøli.

- Taka vit veiðina hjá Norðborg í síni heild, síðan skipið fór í vinnu og umrokna mjølið til ráfisk, snýr samlaða landaða nøgdin til Havsbrún seg um eini 13.000 tons tilsamans. Tá eru eisini aðrir fiskaúrdráttir, sum skipið hevur landað til virkið, tiknir við í uppgerðina, leggur hann aftrat.

### Ymiskir trupulleikar

Kristian Martin Rasmussen vísir á, at síðan Norðborg fór í vinnu, hava teir havt ymiskar trupulleikar at dragast við, men hesir hava tó ikki verið størri enn tað, at skipið hevur mist lítla fiskitíð.

- Í tí stóra hava trupulleikarnir ikki verið størri enn tað, at vit hava kunnað loyst teir so hvørt.

Reiðarin sigur, at sjálvt skipið hevur riggað væl, men okkurt smávegis hevur verið við høvuðsmotorinum, tó ikki so galið, at teir hava verið noyddir at bróta túr av. Hinvegin hava spølini tarnað skipinum nakrar dagar, tá teir høvdu spæltrupulleikar.

- Vit hava eisini havt ymiskar trupulleikar á verksmiðjuni, men teir, ið eftir eru, skulu loysast, nú jólahøgtíðin stundar til, sigur reiðarin.